# Eitt sera virkið ár hjá MBF

**- Nógv halda, at tað er hugsjónarliga at fara á húsagang, um vit skulu lóggeva fyri eitt nú, at allir borgarar hava rætt til skúlagongd, útbúgving, almennar bygningar, tíðindatænastu ella annað. Men, sum er, sær tað út til at vera neyðugt, segði Marjun Sigurðsdóttir**

HANDIKAPPDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- At fáa føroyskt ljóð á talandi teldu, teknmálstulking til aktuellar sendingar, myndaskíggja á fartelefonir og miðnámsskúla til menningartarnaði verða mál, sum koma at verða varðar í framtíðini*

*Mynd: Vilmu nd Jacobsen*

Á fundinum, altjóða handikappdagin, 3. desember, tók Marjun Sigurðsdóttir, formaður í Meginfelag teirra Brekaðu, saman um virksemið hjá limafeløgum MBF's í ári teirra brekaðu.

Hon vísti á, at tað var landsstýrismaðurin í almannamálum, sum hevði útnevnt árið 2003 at vera ár teirra brekaðu í Føroyum, eins og gjørt er í meginpartinum av Evropu.

– Í høpi Sameindu Tjóða verður arbeitt við at endurskoða sonevndu fyrimyndarreglurnar. Ætlanin er at gera reglurnar bindandi fyri tey lond, ið hava skrivað undir sáttmálan – í staðin fyri sum nú, at hesi viðurskifti hvíla á tann góða viljan.

Marjun segði, at eitt høvuðsevni í alheimskjakinum hevur verið, um neyðugt er við serligari verndarlóg ímóti mannamuni millum fólk við førleikatarni og onnur, eins og gjørt er, tá ið talan er um kynini.

– Nógv halda, at tað er hugsjónarliga at fara á húsagang, um vit skulu lóggeva fyri eitt nú, at allir borgarar hava rætt til skúlagongd, útbúgving, almennar bygningar, tíðindatænastu ella annað. Men, sum er, sær tað út til at vera neyðugt.

Marjun greiddi frá, at ein stýrisbólkur varð settur í februar at skipa fyri og veita stuðul til tiltøk, sum høvdu samband við ár teirra brekaðu. Bólkurin umboðaði Almannaráðið, Mentamálaráðið, almennar og privatar arbeiðsgevarar, fakfeløg, Ráðið fyri brekað og Meginfelag teirra Brekaðu.

– Stýrið hevði sín fyrsta fund, 18. februar, og til hendan fundin hevði MBF gjørt eitt yvirlit við hugskotum við eitt nú hesum yvirskriftum: Strategi, upplýsandi tiltøk, mentanarlig tiltøk, kanningartiltøk, landsumfatandi herfer við bussi ella báti, handikappolitisk tiltøk, fyriskiparar og gongdsetarar.

Marjun reisti síðan spurningin, hvussu árið hevur hildnast?

– Grundleggjandi kunnu vit siga, at flest øll feløg, sum eru limir í MBF, hava verið sera virkin, og eru komin kring alt landið. Nógv fólk eru eisini komin til flestu tiltøkini, sum hava verið áhugaverd, bæði fyri almenningin, fakfólk, avvarðandi og tey førleikatarnaðu.

Hon segði, at skjótt gjørdist greitt, at limafeløgini í mest møguligan mun eiga at leita út, har nógv fólk eru, og hetta eigur at gerast bæði í álvara og gaman.

– MBF hevur skipað fyri tiltøkum á flestu stevnum í landinum, eitt nú við fyrilestrum, framsýningum, tónleiki, fólkafundarrøðum og øðrum. Á øllum stevnum høvdu vit teknmálstulking, bæði til røður og eitt nú til sangtekstir. Í summum førum høvdu vit eisini ávirkan á, hvørjir sangir vórðu sungnir, og kórini á stevnunum sungu eyðkennissangir hjá teimum ymisku áhugafeløgunum.

Marjun segði, at MBF lærdi nógv av at luttaka á stevnunum.

– Kommunurnar vóru sera fyrikomandi og hava betrað um atkomuna í teirra bygdum.

Hon vísti á, at kommunur hava av sínum eintingum sett mál á dagsskránna, har førleikatarnað hava verið ein náttúrligur partur. MBF hevur havt meira samstarv við kommunurnar uttanfyri Havnina, ikki minst Fuglafjørð og Klaksvík, sum hava verið sera fyrikomandi.

Sum heild, helt Marjun, at tiltøkini, sum hava verið á stevnunum kring landið, hava fingið fólk at hugsa, og hetta hevur so aftur ført við sær, at ábøtur eru framdar.

– Ferðin hjá psykiatribussinum til framhaldsskúlar, miðnámsskúlar og til almenningin var væl komin. Skrúgongan hjá Sinnisbata fekk eisini góða undirtøku, umframt at almenn tiltøk, fyriskipað av teimum ymisku feløgunum, hava verið væl vitjað.

Marjun segði, at evnisvikan í fólkaskúlanum var eisini væleydnað, har fleiri enn 40 skúlar av umleið 60 luttóku, og somuleiðis eydnaðist tiltakið í ítróttarhøllini á Hálsi væl; har komu fleiri enn 1300 børn.

– Skal eg gera eina varisliga meting um, hvat kemur at seta síni spor í nærmastu framtíð, verður tað í fyrsta lagi atkoman til almennar og privatar bygningar. Tað verður kanska eisini náttúrligt, at øll hava rætt til kunning, upplýsing og útbúgving.

Hon helt, at tað helst kemur at taka eitt sindur longri tíð, áðrenn tey ymisku økini kenna sektorábyrgd, og til arbeiðsmarknaðurin er til reiðar at taka ímóti førleikatarnaðum.

– At fáa føroyskt ljóð á talandi teldu, teknmálstulking til aktuellar sendingar, myndaskíggja á fartelefonir og miðnámsskúla til menningartarnaði verða mál, sum koma at verða varðar í framtíðini.

Marjun Sigurðsdóttir helt tað vera sera týdningarmikið, at størri fatan er millum fakfelagsfólk og áhugafeløgini.

At enda nevndi formaðurin í MBF, hvat tey ymisku limafeløgini hava avrikað í árinum, sum nú er um at verða liðugt.

# At síggja forðingar heldur enn møguleikar

**Tað, sum er ókent og øðrvísi, fær fólk at aftra seg. Hetta man vera galdandi fyri tey flestu av okkum. Á altjóða handikappdegnum, 3. desember, skipaði tásitandi landsstýrismaður í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, fyri framløgu og orðaskifti í Almannaráðnum um viðurskiftini hjá teimum brekaðu við atliti til umstøðurnar hjá hesum á arbeiðsmarknaðinum. Dagurin varð hildin í samband við, at árið í ár, sum skjótt er umliðið, er útnevnt av altjóða samfelagnum at vera "Ár teirra brekaðu" Stuttar framløgur vóru, og síðan var orðaskifti um umstøðurnar hjá teimum brekaðu á arbeiðsmarknaðinum**

HANDIKAPPDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Vit koma ongantíð á mál, men vit eiga at gera okkara besta fyri at nærkast málinum, sum er eitt samfelag fyri øll, segði Páll á Reynatúgvu á fundi í Almannaráðnum altjóða handikappdagin. Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað var Páll á Reynatúgvu, sum beyð vælkomin og vísti á, at altjóða handikappdagur er á hvørjum ári, men í ár er eitt serstakt høvi, tí árið er útnevnt av altjóða samfelagnum at vera ár teirra brekaðu.

## Føroyar fyri øll

– Stýrisbólkurin fyri "Ár teirra brekaðu" valdi at seta ein áhugaverdan spurning á plakatina, sum varð gjørd fyrr í ár. Eitt spurnartekin varð sett eftir útsøgnina: Føroyar fyri øll?

Páll helt, at hetta var ein fyndigur máti at gera vart við viðurskifti teirra brekaðu.

– Hetta er jú ein grundleggjandi spurningur, tá ið vit røða um viðurskiftini hjá teimum, sum ikki kunnu luttaka í samfelagnum sum heild á jøvnum føti við okkum onnur.

Og landsstýrismaðurin helt fram:

– Eru Føroyar fyri øll? Nei, svara óiva tey flestu. Enn vantar nógv í fyri, at samfelagið verður nóg rúmligt – eisini fyri tey, sum eru eitt sindur øðrvísi skapt enn tann stóri hópurin.

Páll segði, at Almannaráðið hevði bjóðað til hendan fundin fyri at taka saman um tey tiltøk, sum hava verið fyriskipað í hesum árinum.

Hann segði seg fegnast um tey tiltøk, sum Stýrisbólkurin fyri "Ári teirra brekaðu" og MBF og tess limafeløg hava tikið stig til í árinum.

## Nógvir fordómar

Almenni arbeiðsmarknaðurin, arbeiðsgevarasíðan og Almannastovan vóru eisini umboðaði á fundinum í Almannaráðnum hendan, 3. desember.

– Hvussu kunnu vit tryggja fólki við skerdum førleika atgongd til arbeiðsmarknaðin?

Landsstýrismaðurin vísti á, at forðingarnar hjá fólki við breki á arbeiðsmarknaðinum bæði eru praktiskar, men hesar hava eisini sín uppruna í fordómum – og fordómar taka seg ofta upp, tá ið fólk ikki hava nóg nógva vitan um tey viðurskifti, sum fordómarnir snúgva seg um.

– Tað, sum er ókent og øðrvísi, fær fólk at aftra seg, soleiðis at hesi síggja forðingar heldur enn møguleikar. Hetta man vera galdandi fyri tey flestu av okkum – bæði tann "normala" hópin, um eg kann loyva mær at brúka eitt slíkt orð og fyri tey, sum ikki finna sær pláss í tí "normala" hópinum, tí tey bera brek.

## Samfelag fyri øll

Páll segði seg vóna, at fundurin kundi verða eitt stig á røttu leiðini fram ímóti einum rúmligari arbeiðsmarknaði.

– Vit fara at umrøða tey tiltøk, sum eru hildin í skjótt farna árinum, og vit fara undir eitt arbeiði at virka fyri einum rúmligari arbeiðsmarknaði. "Ár teirra brekaðu" er næstan farið aftur um bak, men arbeiði at betra um kor teirra brekaðu heldur fram. Vit koma ongantíð á mál, men vit eiga at gera okkara besta fyri at nærkast málinum, sum er eitt samfelag fyri øll, segði Páll á Reynatúgvu.

# Fleiri vard størv

**Leiðarin á arbeiðsmarknaðardeildini hjá Almannastovuni, Marjun Berg, heldur, at tað gongur rætta vegin við at fáa fólk við skerdum vinnuførleika út á arbeiðsmarknaðin**

HANDIKAPPDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Marjun Berg, sum er leiðari á arbeiðsmarknaðardeildini á Almannastovuni, segði eisini nøkur orð á fundinum í Almannaráðnum, altjóða handikappdagin, 3. desember.

Hon greiddi frá, hvat Almannastovan hevur gjørt fyri at fáa fólk við breki út á arbeiðsmarknaðin.

– Upprættað er deild við stórari ekspertisu á Almannastovuni við leiðara, sum hevur hetta økið um hendi.

Hon segði, at politiskt hevur hetta økið verið ovarliga raðfest.

– Í samgonguskjalinum fyri 2002-2006 stendur, at almannaverkið saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum skal tryggja fólki við skerdum arbeiðsførleika atgongd til útbúgvingar ella arbeiðsmarknaðin.

Marjun segði, at vegleiðing um vard størv varð gjørd á vári 2002, og innan langa tíð sær ein vegleiðing um endurútbúgving dagsins ljós.

– Heystið 2002 luttók Almannastovan á almennari ráðstevnu um trivnaðar-og heilsumál í Norðurlandahúsinum. Her varð kunnað um hugtakið um "rúmliga arbeiðsmarknaðin", og hvørjar stuðulsskipanir eru, ið kunnu hjálpa til at geva persónum við skerdum vinnuførleika fótafesti á arbeiðsmarknaðinum.

Hon segði, at Almannastovan hevur hildið tveir kunningarfundir við fakfeløgini, og somuleiðis hevur stovnurin havt tveir fundir við Vinnuhúsið.

– Á hesum fundum eru arbeiðsgevarar kunnaðir um, hvørjir stuðulsmøguleikar eru.

Marjun segði, at Almannastovan eisini hevur hildið fyrilestrar, eitt nú í hølunum hjá MBF, og at stovnurin hevur neyvt og støðugt samband við meginfelagið.

– Í august var Almannastovan á eini kunningarferð um alt landið, har samstarvspartar vórðu innbodnir.

Hon vísti á, at tá varð eisini kunnað um møguleikarnar eftir forsorgarlógini at stuðla fólki við skerdum vinnuførleika.

– Almannastovan hevur neyvt samstarv við Alvskúlan við Áir og við Alvvirksemið í Smiðjugerði. Bæði skúlin og virksemið í Smiðjugerði eru "stovnar" fyri fólk við skerdum vinnuførleika.

Marjun Berg helt, at tað gongur rætta vegin.

– Í ár 2000 vórðu stovnað trý vard størv, í ár 2001 var talið 8, í ár 2002 19, og higartil í ár eru stovnað 20 vard størv, segði hon.



*Marjun Berg heldur, at tað gongur rætta vegin. - Í ár 2000 vórðu stovnað trý vard størv, í ár 2001 var talið 8, í ár 2002 19, og higartil í ár eru stovnað 20 vard størv, sigur hon.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*